# LEIKSKRÁ

11. UMFAR

4. JULI 2020

BLAÐ NR. 07




HAVSBRÚN

VÆLKOMIN TIL
DYST Í FLØTUGERÐI

betri
DEILDIN

# Innihald


Dysturin í dag ........ 4
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá monnum ........ 8
Liðuppsetingin hjá ÍF og HB ........ 10
Leikarin hesaferð ........ 14
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá kvinnum ........ 18
Seinasti dysturin ........ 22
ÍF-sangurin ........ 24



**ÍF**, Ítróttarfelag Fuglafjarðar, 530 Fuglafjørður, tel. 228771, if@if.fo, www.if.fo.
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur. **Ábyrgd:** ÍF-fótbóltur. **Uppsetan:** Maibritt P. Bærentsen.



MAGN KAFFI
NÝMALIÐ • VISTFRØÐILIGT





HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fi



**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ

# Dysturin í dag

Ja nú skal tað verða, og í dag verður tað. Vit taka í dag ímóti HB, og í dag fara vit at vinna á HB.

Tað man verða kennslan hjá nógvum fuglfirðingum til dagsins dyst, sum eisini er partur av skránni á Varmakelduskránni. Eftir leikskránni, so skuldi ÍF spælt á útivølli í Gundadali ímóti HB, men av tí, at liðið úr Fløtugerði eigur 2 heimadystir ímóti HB í landskappingini í 2020, so bleiv dysturin tíbetur fluttur til Fuglafjarðar.

Tað er stórfelagið og oddaliðið HB (Havnar Bóltfelag), sum eru komnir hendan vegin at vinna 3 stig afturat og leggja tey afturat teimum 25, sum liðið longu hevur skava saman. Fyrr í ár vann HB 3-1 í Fuglafirði, men síðani tá hevur ÍF ment seg nógv sum lið, og hevur fingið gongd í gott spæl og góð úrslit.

Kravið til HB er á hvørjum árum tað sama: Sigursvanda felagið setur sær sum mál at vinna FM, og tað er tað einasta sum er gott nokk fyri eitt so stórt felag. Teir hava fingið eina góða byrjan uppá landskappingina higartil, og hava bert tapt tann eina dystin higartil av teimum 10, sum teir hava leikt.

Stendur tað upp til okkara røsku dreingir á ÍF-liðnum, so koyra vit HB í skápið í dag og senda teir aftur til Havnar við ongul í reyv og einum ósigri, sum fer at hoyrast aftur í føroyska fótbóltslandslagnum. Tað hava higartil ikki verið nøkur úrslit, sum hava verið ordiga óvæntað, men eftir dystin í dag, so fer eitt úrslit at standa eftir, sum nógv fer at verða tosa um.

Okkara venjarapar og okkara leikarar koyra á til venjing viku út og viku inn, og tað er sera hugaligt, at hetta nú alvorliga sæst aftur á spælinum, innsatsinum og úrslitunum, sum alt byrjar at fløska seg rætta vegin.

Gita vit eitt úrslit, ja so giti eg, at vit vinna 3-1 í dag, og at Uros, Filip og Dánjal fara at skora okkara mál. Tað er kennslan hjá mær, at vit taka fetið upp ímóti teimum stuttligu plássunum í dag.

Tað krevur, at vit enn einaferð standa saman um dreingirnar í reyðum og hvítum og gera okkara fyri, at teir skulu merkja, at vit eisini vilja, at ÍF í Betri-deildini anno 2020 er eitt lið, sum man skal rokna við og kemur frá nú av at skapa úrslit, sum ongin hevði droymt um, tá ið kappingin fór í gongd 9.mai.

**Góðan dyst øll somul og góða varmakeldu.**











SPEKT
løggildir grannskoðarar

Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG
samskip




Fønix
Mykinesgøta 8 · Boks 18 · FO-110 Tórshavn · Tel 31 19 09

KELDA: FAROESOCCER

## 10. UMFAR

### Betri-deildin Menn

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 10 | 8 | 1 | 1 | 26 | 9 | 17 | 25 |
| 2 | NSÍ | 10 | 7 | 2 | 1 | 25 | 6 | 19 | 23 |
| 3 | KÍ | 10 | 7 | 2 | 1 | 28 | 10 | 18 | 23 |
| 4 | B36 | 10 | 7 | 1 | 2 | 29 | 13 | 16 | 22 |
| 5 | ÍF | 10 | 5 | 1 | 4 | 13 | 20 | -7 | 16 |
| 6 | Víkingur | 10 | 4 | 2 | 4 | 15 | 15 | 0 | 14 |
| 7 | EB/Streymur | 10 | 2 | 1 | 7 | 6 | 19 | -13 | 7 |
| 8 | TB | 10 | 1 | 3 | 6 | 6 | 13 | -7 | 6 |
| 9 | AB | 10 | 0 | 4 | 6 | 7 | 27 | -20 | 4 |
| 10 | Skála | 10 | 0 | 1 | 9 | 7 | 30 | -23 | 1 |

Niðurflytingar strikan til 1. deild

| HETTA UMFARIÐ | 12. UMFAR |
|---|---|
| HB - ÍF | ÍF - Skála |
| NSÍ - EB/Streymur | Víkingur - AB |
| Skála - Víkingur | EB/Streymur - HB |
| AB - B36 | TB - NSÍ |
| KÍ - TB | B36 - KÍ |

## TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 8 |
| 2 | Jóannes **Bjartalíð** (KÍ) | 7 |
| 3 | Klæmint A. **Olsen** (NSÍ) | 7 |
| 4 | Uros **Stojavnoc** (ÍF) | 7 |
| 5 | Adrian **Justinussen** (HB) | 6 |
| 6 | Meinhard E. **Olsen** (B36) | 6 |
| 7 | Michal **Przybylski** (B36) | 5 |
| 8 | René S. **Joensen** (HB) | 5 |
| 9 | Árni **Frederiksberg** (B36) | 4 |
| 10 | Jan I. **Hansen** (Skála) | 4 |

## TOPP 10

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Jann **Benjaminsen** (NSÍ) | 7 |
| 2 | Philip **Djordjevic** (ÍF) | 6 |
| 3 | Jóannes **Bjartalíð** (KÍ) | 6 |
| 4 | Daniel **Johansen** (HB) | 5 |
| 5 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 5 |
| 6 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 5 |
| 7 | Árni **Frederiksberg** (B36) | 4 |
| 8 | Meinhard E. **Olsen** (B36) | 4 |
| 9 | Sebastian **Pingel** (B36) | 4 |
| 10 | Stefan **Radosavljevic** (B36) | 4 |






# 11. UMFAR

betri DEILDIN

## ÍF

| | |
|---|---|
| Tóri T. Traðará (M) | 1 |
| Jan Ó. Ellingsgaard (L) | 3 |
| Jens Joensen | 4 |
| Karl Løkin | 6 |
| Dánjal á Lakjuni | 7 |
| Uros Stojanov | 8 |
| Filip Djordjevic | 9 |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 10 |
| Hákun Edmundsson | 11 |
| Hans Jákup Lervig | 12 |
| Jákup N. Olsen (M) | 13 |
| Gundur E. Petersen | 14 |
| Bogi A. Løkin | 15 |
| Sámal Joensen | 17 |
| Pól Jákup Lundsbjerg | 18 |
| Rói Róin | 19 |
| Jóhan Petersen | 20 |
| Tóri N. Olsen | 21 |
| Sjúrður Pauli Nielsen | 22 |
| Andy Ó. Olsen | 23 |
| Milos Budakovic (M) | 25 |
| Ólavur Larsen | VENJARI |
| Hans Jørgen Djurhuus | VENJARI |
| Pauli Jarnskor | MÁLMANSVENJ. |
| Milan Svojic | HJÁLPARVENJ. |

LIÐLEIÐARAR: TRÚGVI NESÁ, ÓLAVUR ELLINGSGAARD, POUL N. MIKKELSEN OG PALLI VANG

FYSIO: HANUS ELIASEN, ÁLVUR HANSEN OG JÓNFRÍÐ HANSEN

## HB

| | |
|---|---|
| 1 | Teitur M. Gestsson (M) |
| 3 | Jógvan Rói Davidsen (L) |
| 4 | Heðin Hansen |
| 5 | Delphin Tshiembe |
| 6 | Daniel Johansen |
| 7 | Adrian R. Justinussen |
| 8 | Dan í Soylu |
| 9 | Tróndur Jensen |
| 10 | René Shaki Joensen |
| 11 | Pætur J. Petersen |
| 13 | Mads B. Mikkelsen |
| 14 | Jákup L. Thomsen |
| 15 | Heri H. Mohr |
| 16 | Jákup Højgaard (M) |
| 17 | Bartal Wardum |
| 18 | Mathias Nygaard |
| 19 | Hørður Askham |
| 20 | Ási P. Dam |
| 21 | Mikkel Frankoch |
| 22 | Dánjal Reginsson |
| 23 | Hanus Pauli Danielsen |
| 24 | Kevin Schindler |
| 25 | Øssur M. Dalbúð |
| 27 | Teit Jacobsen |
| 28 | Samuel J. Chukwudi |
| 29 | Áki D. Samuelsen |
| VENJARI | Jens Berthel Askou |
| HJÁLPARVENJ. | Kevin Schindler |
| FYSISKUR VENJ. | Sebastian Dam |
| FYSISKUR VENJ. | Óla Hendrik av Fløtum |

LIÐLEIÐARAR: HEÐIN WEIHE OG UNI NIELSEN

LÆKNI: TORMÓÐUR STÓRÁ. FYSIO: JÓAN MAGNUS DALBØ

| | | |
|---|---|---|
| DÓMARI | Jóhan Hendrik Ellefsen | |
| HJÁLPARDÓMARAR | 1. Regin Egholm | 2. Marner Forná Olsen |
| 4. DÓMARI | Rúni Olsen | |
| EYGLEIÐARI | Jónfinn Olsen | |

BÓLTSTUÐUL: SVENNING HANSEN




MOWI

FAROE ISLANDS

RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY NATURE



**FULLKOMILEIKIN HEVUR EITT NAVN.** Hon eitur Rinka. Hon er sterk. Sjáldsama vøkur. Rinka veksur seg til í Føroyum og verður myndað av brimi og kyrru. Tað er hetta, sum ger hana til heimsins besta laks. Handfarin við nærlagni. Handfarin av náttúruni.

Hetta er Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

RINKA.FO







Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60



1

LEIKARIN

# TÓRI TRAÐARÁ

**TEKST OG MYND:** ATLI PETERSEN

## TÚ

**Navn:** Tóri Traðará.
**Føðingardagur:** 16.07.1996.
**Føðistað:** Tórshavn.
**Starv:** Maskinsmiður.
**Pláss á vøllinum:** Málmaður.
**Yvirtrúgv:** Um eg malið runt ein veg, so má eg runt hinvegin aftur.
**3 orð sum lýsa teg:** Spentur, sjálsikkur og góður.
**Torførasti mótstøðumaður:** Eingin.
**Frítíðarítriv:** Einki.
**Vónir fyri 2020:** At koma inn á liðið í august.

## TÍN ÍTRÓTT:

**Fyrsti dystur á 1.liðið:** Veit ikki.
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Veit ikki.
**Aðrar ítróttargreinar:** Flogbóltur.
**Minningarríkasti dystur:** NSÍ, tók tvey straffir.
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Jákup Mikkelsen.
**Besti fótbóltsleikari:** Tóri Traðará.
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Flogbólt.

**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Har eg eri við, so er ervið fínt.
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Taktisk venjing.

## TÍNIR FAVORITTAR:

**Matur og drekka:** Røst súpan og vatn.
**Slag av tónleiki:** Alt.
**Sjónvarpssending:** New Girl.
**At slappa av:** Við damuni.

## TROYGGJA NR. 1

**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** CR7.
**Stuttligasti persónur:** Gutti Hansen.
**Stuttligasti í hópinum:** Ari Ó. Ellingsgaard.

**Besti ÍF áskoðari:** Gutti Hansen.




## FAKTA UM TÓRA

Fekk ein ógvusligan skaða í fyrsta dystinum í 2019, sum gjørdi at hann er enn úti. Men er vónandi klárur eftir summar.

Kann ikki verða lætt at verða Tóri, tá tað verður tosa um politikk, tá svigerfar stillar upp fyri Tjóðveldi og mamma sín upp fyri Sambandi.

Hóast sítt sinnalag, so hevur hann bert fingið eitt reytt kort og var hetta í 2017.

OKKARA KJARNUØKI

GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD



SENDISTOVAN

Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald

Bilverkstaðið á Kambsdali
Tlf. 441111

A Member of The Linde Group
AGA-FØROYAR




AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo

KELDA: FAROESOCCER

## 7. UMFAR

### Betri-deildin Kvinnur

betri DEILDIN

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 7 | 7 | 0 | 0 | 15 | 5 | 10 | 21 |
| 2 | NSÍ | 7 | 2 | 3 | 2 | 14 | 8 | 6 | 9 |
| 3 | ÍVB | 7 | 2 | 3 | 2 | 9 | 10 | -1 | 9 |
| 4 | B36 | 7 | 1 | 4 | 2 | 8 | 9 | -1 | 7 |
| 5 | HB | 7 | 1 | 3 | 3 | 10 | 11 | -1 | 6 |
| 6 | EBS/Skála | 7 | 1 | 1 | 5 | 5 | 18 | -13 | 4 |

**HETTA UMFAR**
5. juli 2020

- KÍ - ÍVB
- NSÍ - HB
- B36 - EBS/Skála

**KOMANDI UMFAR**
12. juli 2020

- NSÍ - ÍVB
- KÍ - B36
- HB - EBS/Skála

## TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Heidi **Sevdal** **(NSÍ)** | 6 |
| 2 | Eyðvør **Klakstein** **(KÍ)** | 4 |
| 3 | Jacoba **Langgaard** **(ÍVB)** | 4 |
| 4 | Evy **á Lakjuni** **(KÍ)** | 3 |
| 5 | Rannvá **Andreasen** **(KÍ)** | 3 |
| 6 | Bára **Magnussen** **(B36)** | 2 |
| 7 | Julia Naomi **Mortensen** **(HB)** | 2 |
| 8 | Kára **Djurhuus** **(HB)** | 2 |
| 9 | Malena **Olsen** **(KÍ)** | 2 |
| 10 | Mona **Rasmusdóttir** **(ÍVB)** | 2 |

## TOPP 10

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Evy **á Lakjuni** **(KÍ)** | 6 |
| 2 | Julia Naomi **Mortensen** **(HB)** | 4 |
| 3 | Heidi **Sevdal** **(NSÍ)** | 3 |
| 4 | Jensa **Tórolvsdóttir** **(ÍVB)** | 3 |
| 5 | Sanna **Svarvadal** **(KÍ)** | 3 |
| 6 | Sara **Lamhauge** **(HB)** | 3 |
| 7 | Elmi **Isaksen** **(HB)** | 2 |
| 8 | Emma **Hansdóttir** **(B36)** | 2 |
| 9 | Jacoba **Langgaard** **(ÍVB)** | 2 |
| 10 | Laila **Pætursdóttir** **(NSÍ)** | 2 |



Bilasølan
Vegurin Langi 43 | 188-Hoyvík | 359700 | bilasolan.fo
.com/bilasolan .com/bilasolan



# Leiðandi reiðarí í norðurhøvum




**VARÐIN** P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

**Vit takka fyri stuðulin**

multiputl

Vit sveisa vinyl, gera HVS arbeiði
og putlast við alt møguligt annað …

tel. +298 207575 | multiputl@multiputl.fo



UNDANFARNA UMFAR

**10. UMFAR**

**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ.
**MYND:** PALLI VANG

# ÍF-TB

Sunnudagin 28.juni kl. 15.00 møttust ÍF og TB í Fløtugerði til ein dyst, har tað má sigast, at ÍF varð stórur favorittur. Higartil í landskappingini í 2020 hevði dagsins heimalið fingið 13 stig í 5 dystum ímóti teimum 5 liðunum, sum vórðu aftanfyri ÍF á stigatalvuni. Liðini høvdu spælt dyst ímóti hvørjum á heimvøllinum hjá TB, har okkara dreingir í reyðum og hvítum høvdu megna ein fínan 0-0 javnleik. Eitt góðkent úrslit á einum sera truplum útivølli.

Dysturin hendan sunnudagin síðst í juni byrjaði eitt sindur varliga, og spælið gekk nokkso javnt fyrstu løtuna. Nakrir einstakir hálvir málmøguleikar vóru til báðar partar í fyrra hálvleiki. Tað varð TB, sum fekk tann største kjansi fyrstu 45 minuttirnar, tá ið ein av TB-leikarunum kom at standa væl fyri inni í brotsteiginum hjá ÍF. Skotið ímóti málinum bleiv blokera av ÍF-verjuni, sum síðani fekk bóltin burtur av vandaleið. Heimaliðið hevði onkur einstøk skot úr hampuligari stórari frástøðu, men rættiliga vandamikið bleiv tað ikki. Støðan varð 0-0, tá ið liðini fóru til hálvleiks.

Tað kom beinanvegin meira lív í á vøllinum í seinna hálvleiki, og bæði liðini vístu í løtum, at tey vildu veruliga kempa fyri einum góðum og brúkiligum úrsliti. Tað kom bert tað eina málið í hesum týdningamikla dysti, og varð tað heimaliðið ÍF, sum fekk hetta mál, tá ið uml. 60 minuttir vóru leiktir.

Sjúrður Pauli fangaði bóltin nakað frammi á hálvuni hjá TB, og hann fekk spælt bóltin út til Filip í høgru síðu. Filip sendi beinanvegin bóltin inn frammanfyri málið hjá TB. Har kom stórskjúttin Uros skoytandi, og hann fekk sett fótin á bóltin, so hann fór í málið hjá TB, og harvið bleiv støðan 1-0 til ÍF. Eitt rættiligt "strikara-mál" má sigast.

Uros er nú komin uppá 7 mál í landskappingini, og Filip er komin upp á 6 upplegg. Fantastiska flott av hesum báðum leikarum, sum til hetta kappingarárið eru nýggjir í ÍF-hópinum. Saman við hinum leikarunum á ÍF-liðnum vísa teir, at í ár eigur liðið úr Fuglafirði at hyggja upp eftir at enda á einum plássi í topp-5. Liðið er gott og verður meira samanspælt fyri hvønn dyst. Spennandi hjá venjaraparinum Ólavi og Hans Jørgin at síggja, at harða arbeiðið til venjing sær út til at bera frukt.

Dysturin endaði 1-0 til ÍF, og tað er nú ein sannroynd, at ÍF hevur fingið 16 stig eftir 10 dystir ímóti teimum 5 liðunum, sum leru aftanfyri á stigatalvuni. Verður næsta flotta úrslitið ímóti HB, tá ið havnamenn vitja í Fløtugerði leygardagin 4.juli? Ja eg trúgvi uppá tað, og tað eiga leikarar, venjaratoymið og allir ÍF-fjepparar eisini at trúgva uppá.

**Koyr á ÍF :-)**



# „Vit eru ÍF-fan“

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**

**TAKKAR FYRI STUÐULIN**